## Arsenal vil hava Defour

Enska stórfelagið Arsenal er áhugað í at keypa 20 ára gamla Steven Defour, sum er liðformaður á belgiska liðnum Standard Liege. Skysports heldur seg vita, at Arsenal er til reiðar at gjalda 70 milliónir krónur fyri belgiska stórtalentið, sum longu hevur spælt 16 landsdystir. Men feløg sum Ajax, Palermo, Lyon og Middlesbrough skulu eisini verða áhugað í spælaranum.



## Klinsmann vil ov nógv

Leiðslan í týska stórfelagnum FC Bayern stuðlar framvegis venjaranum í felagnum, Jurgen Klinsmann, hóast úrslitini var verið misjøvn seinastu vikurnar. - Hann vil náa alt beinanvegin, men Rom varð ikki bygdur eftir einum degi. Hann brúkar nógva tíð í felagnum, og eg havi sagt við hann, at hann skal sova eitt sindur longri onkrar morgnar, sigur Uli Hoeness, stjóri í Bayern.

KÍ-NSÍ 0-1 (0-1):

# KÍ skoraði sigurmálið fyri NSÍ



åKlaksvíkingar skutu sjálvir einasta málið, sum fall í seinasta heimadystinnum. Málið fall tó í skeiva endanum, men úrslitið á Sandi lagaði tað kortini so, at KÍ eisini í 2009 spælir í Formula-deildini

*Mynd: Norðlýsið*

**KÍ skoraði enn einaferð í egið mál, og tað gjørdist munurin í dystinum í Klaksvík í gjárkvøldið. Heimaliðið royndi at trýsta í seinna hálvleiki, men NSÍ var líka nær við at skora**

KÍ-NSÍ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*KÍ*

*NSÍ*

Dysturin í Klaksvík var ikki meira enn byrjaður, so hevði KÍ gjørt tað, sum teir hava verið góðir til seinastu vikurnar – nevniliga at skora sjálvmál. Á Toftum skoraði Kí sigursmálið fyri B68, í botndystinum ímóti B71 hjálpti KÍ til við einum máli fyri B71, og aftur í gjárkvøldið beindu teir bláu og hvítu bóltin í egið mál.

Ungi og evnaríki bakkurin Ári Samson var óheppin, tá Hjalgrím Elttør sendi innfyri úr vinstru, bólturin rakti hann í fótin og støkk í meskarnar aftanfyri Jákup Mikkelsen. Ein óheppin byrjan hjá unga spælaranum, sum hevði fingið møguleikan, men hann fótaði sær og spældi seg uppaftur.

NSÍ hevði munin í fyrra hálvleiki. Runavíkingar spældu skilabetri og høvdu rímiligt tak á støðuni. KÍ hevði onkrar royndir frá Rodrigo og eitt drønskot frá Eli Simonsen, men einki mál kom.

### KÍ trýsti

Í seinna hálvleiki setti KÍ meira ferð á, og í løtum trýsti heimaliðið ófført. Tað endaði við nógvum deyðbóltsstøðum, sum vóru við at skapa vanda, men KÍ megnaði ongantíð at spæla seg til opnar málkjansir.

Óli Hansen og Johan Troest Davidsen í miðverjuni vóru raskir at koma ímillum og standa fyri, tá KÍ sendi bóltar inn í brotsteigin, og málmaðurin Tórður Thomsen slapp undan at gera tær stóru bjargingarnar.

Sum seinni hálvleikur leið, kom NSÍ spakuliga við í dystin aftur, og seinasta korterið vóru runavíkingarnir vandamiklir. Jákup Mikkelsen, sum eftir dystin varð kosin ársins KÍ-spælari, hevði onkra stórbjarging, sum forðaði fyri, at NSÍ økti um leiðsluna.

### Kegl og ljótar taklingar

Onkrir drúgvir steðgir vóru í seinna hálvleiki, og FIFA-dómarin Petur Reinert legði seks minuttir afturat. Men nógva av yvirtíðini fór við grenji, keglið og keðiligum taklingum.

Og meðan eitt grovt heglingsæl skolaði yvir Injector Arena, kundi klaksvíkingar at enda fegnast um, at B71 tapti sín dyst, og so hevði ósigurin ímóti NSÍ ongar keðiligar avleiðingar fyri klaksvíkingar.

NSÍ hevur við sigrinum spælt seg inn aftur í dystinum um bronsuheiðursmerkini.

## Jan og Jákup heiðraðir

**Bláa Bylgjan, sum er fjepparafelagið hjá KÍ, heiðraði eftir dystin í gjár Jan Joensen og Jákupi Mikkelsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta varð gjørt á samkomu í Café KÍ, sum seinnu árini hevur verið partur av KÍ-høllini.

Teir báðir vórðu heiðraðir fyri avrik síni í KÍ.

Jan Andreasen hevur verið partur av besta liðnum hjá KÍ í 18 ár, og hevur hann millum annað verið við til at vinna tvey meistaraheiti hesi árini.

Fyri trúgvu tænastuna – og kanska eisini fyri sigursmálið móti B71 fyri góðum mánaði síðani – fekk Jan serliga minnisplátu frá fjepparunum, sum helst fegnir síggja Jan sum part av liðnum í 2009 eisini.

Jákup Mikkelsen hevur ikki spælt eins nógv ár í KÍ. Landsliðsmálverjin hevur gjørt fult so nógv vart við seg uttanlands, har Danmark, Noreg og Skotland eisini hava staðið á visitkortinum, eins og hann í tvey ár vardi málið hjá B36.

Men tað var eingin ivi, tá besti KÍ'arin hetta kappingarárið skuldi kjósast, og varð málverjin eisini heiðraður fyri hetta.



*Eyðun Torgeirsson, formaður í Bláu Bylgjuni, saman við Jan Andreasen og Jákupi Mikkelsen*

*Mynd: Hans J. Heinesen*